## VEÐRIÐ

### Veðrið í Klaksvík í sambandi við 100 ára hald og Sjómannadag




**Veðrið fríggjadagin**
Fyrrapartin og seinnapartin skýggjað, men turt. Landsynningur 5 m/s. Um kvøldið sól, turt og 13 stig.




**Veðrið leygardagin**
Landsynningur millum 6 og 9 m/s. Fyrrapartin og seinnapartin sólarglottar, um kvøldið skýggjað, men turt allan dagin. Hitin millum 12 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin**
Landsynningur millum 8 og 10 m/s. Sólarglottar um dagin, men skýggjað um kvøldið. Turt, og hitin millum 12 og 13 stig.

# Magni og Vígdis í Smiðjuni

**Leygardagin letur listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík. Tað eru tey bæði sytskinarbørnini, Magni Dalsgaard og Vigdis Sigmundsdóttir, ið sýna fram akvarellir og klippmyndir**

Hjá Magna Dalsgaard, sum er útbúgvin arkitektur og er sjálvlærdur teknari og málari, eru verkini akvarellir úr Føroyum og frá ferðum uttanlands. Vigdis Sigmundsdóttir sýnir fram klippmyndir. Hon er sjálvlærd innan hesa listagrein, men er annars útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur og interiør designari. Vigdis er dóttir kenda listamálaran Sigmund Petersen, sum hon er inspirerað av.

Magni er somuleiðis inspireraður av Sigmundi, tí hann er uppvaksin í grannalagnum, har hann hevur sæð Sigmund tekna og mála.

Vigdis og Magni hava fyrr sýnt fram saman og hvør sær. Vigdis hevur gjørt stóra frímerkjarøð fyri Postverk Føroya, ið hevur verið sýnd fram í grannalondunum.

Fernisering verður í Smiðjuni leygardagin klokkan 13, og opið verður fram til við týsdagin 19. august. Allar dagar frá klokkan 13 til 18.




*Frá leygardagin til týsdagin sýna systkinabørnini Magni Dalsgaard og Vígdis Sigmundsdóttir fram í Smiðjuni í Lítluvík*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 16 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 34 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 31 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 15 |
| New York | 27 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ





Eitt lágtrýst norðarlaga í Norðsjónum ferðast í ein landnyrðing og grynnist. Ein veikur hátrýstryggur yvir Íslandi ferðast spakuliga í ein landsynning, meðan eitt lágtrýst ferðast vestaneftir ímóti Írlandi. Leygardagin ferðast lágtrýstið nakað norðureftir, meðan eitt annað lágtrýst ferð í ein eystan, suður um Ísland. Tilhoyrandi brúgvaløg nærkast sunnaneftir, og verða við Føroyar sunnunáttina (Kelda: yr.no)

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/08 kl. 06[00] – 12/08 06[00]. Hitin í gjár: 10.9°
Minsti hiti máldur í august: 0,4° - Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 11/08 kl. 06[00] – 12/08 06[00].
Avfallið higartil í august: 2 mm




Lesið
Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

8. august Fyrra kvarter
10. august Mánin longst frá jørðini
16. august Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. aug. | 5:39 | 18:01 | 4:39 | 17:01 | 4:54 | 17:16 | 7:39 | 20:01 | 8:39 | 21:01 | 3:54 | 16:16 | 2:54 | 15:16 | 5:54 | 18:16 | 6:54 | 19:16 | 5:24 | 17:46 | 6:39 | 19:01 |
| 15. aug. | 6:19 | 18:40 | 5:19 | 17:40 | 5:34 | 17:55 | 8:19 | 20:40 | 9:19 | 21:40 | 4:34 | 16:55 | 3:34 | 15:55 | 6:34 | 18:55 | 7:34 | 19:55 | 6:04 | 18:25 | 7:19 | 19:40 |
| 16. aug. | 7:02 | 19:23 | 6:02 | 18:23 | 6:17 | 18:38 | 9:02 | 21:23 | 10:02 | 22:23 | 5:17 | 17:38 | 4:17 | 16:38 | 7:17 | 19:38 | 8:17 | 20:38 | 6:47 | 19:08 | 8:02 | 20:23 |
| 17. aug. | 7:45 | 20:05 | 6:45 | 19:05 | 7:00 | 19:20 | 9:45 | 22:05 | 10:45 | 23:05 | 6:00 | 18:20 | 5:00 | 17:20 | 8:00 | 20:20 | 9:00 | 21:20 | 7:30 | 19:50 | 8:45 | 21:05 |
| 18. aug. | 8:26 | 20:45 | 7:26 | 19:45 | 7:41 | 20:00 | 10:26 | 22:45 | 11:26 | 23:45 | 6:41 | 19:00 | 5:41 | 18:00 | 8:41 | 21:00 | 9:41 | 22:00 | 8:11 | 20:30 | 9:26 | 21:45 |